Nýggj føroysk sjónvarpsrás

Arbeitt verður í løtuni við at skipa Rás 1 hjá Televarpinum. Líkt er til, at føroyingar við hesari rásini fáa eina rás, sum fer at senda føroyskt framleitt tilfar av ymsum slag. Millum annað eru tvey føroysk fótbóltsfeløg áhugaði í at senda á Rás 1

SJÓNVARP
Heri á Rógvi

Millum annað tvey føroysk fótbóltsfeløg hava áhuga í at fara undir at senda føroyskan fótbólt á Rás 1 hjá Televarpinum, sum eftir ætlan fer at senda einaferð í komandi ári.

Mynd: Jens Kristian/Álvur

Rás 1, sum er ein av rásunum í útboðnum hjá Televarpinum og Televarpið sjálvt eigur, hevur higartil ikki sent nakað enn. Ein onnur rás er løgd á plássi hjá Rás 1, men hetta verður kanska ikki so øgiliga leingi afturat. Talan verður tá um eina rás, sum eftir øllum at døma fer at senda føroyskt tilfar burturav.

– Tú kanst kalla hana eina alternativa føroyska sjónvarpsrás, sigur Tróndur Djurhuus, stjóri fyri Televarpið.

Ein verkætlan er sett í gongd, sum millum annað hevur til endamáls at savna saman áhugamálini hjá teimum, ið hava vent sær til Føroya Tele við fyrispurningum. Stjórin í Televarpinum kallar verkætlanina fyri eitt kanningararbeiði.

Elin Heinesen er sett til at taka sær av hesi uppgávuna, og hon hevur higartil verið til arbeiðis í eina góða viku. Eftir ætlan skal ein rapport fyriliggja 28. februar.

– Úrslitið av hesum arbeiðinum skal so geva okkum eina fíggjarliga meting av, hvat er møguligt at fara í holt við. Vit ætla ikki, at tað skal taka fleiri ár at fáa hesa rásina upp á beinini, men ætla heldur at fara skjótt í gongd, sigur Tróndur Djurhuus.

Í sama viðfangi nevnir, hvør týdningurin av teimum næstu mánaðunum er.

Hann leggur serliga stóran dent á, at tað ikki verður Televarpið, sum fer at senda nakað sum helst av redaktionellum tilfari.

– Vit eru ikki nakar fjølmiðil og hava ongar ætlanir um at gerast ein. Vit eru ein útbreiðslu fyritøka, og tað vera so onnur, sum kunnu senda á netinum hjá okkum, men tað vera ikki vit, ið standa fyri hesum sjálvir, sigur Tróndur Djurhuus.

Føroyskur fótbóltur

Sambært Tróndi Djurhuus og Elini Heinesen hevur Televarpið – ella rættari sagt Føroya Tele – fingið rímiliga nógvir fyrispurningar frá feløgum, fyritøkum, einstaklingum og øðrum, sum hava víst áhuga fyri at sleppa at senda sjónvarp á Rás1.

Tað skal nevnliga eisini við, at tað er Føroya Tele, sum er arbeiðsgevari hjá Elini Heinesen, og tað er sostatt móðirfyritøkan, sum stendur fyri arbeiðinum.

Fyrispurningar eru millum annað komnir frá tveimum føroyskum fótbóltsfeløgum um at senda fótbóltsdystir. Enn ber illa til at siga nakað um, hvørt hetta verður sent beinleiðis, við samandráttum ella á annan hátt.

Ísak Mikladal, aðalskrivari í Fótbóltssambandinum, váttar, at hetta ber hjá feløgunum, tá hugsað verður um rættindi.

– Tað er tann vanliga hugsanin, at tað eru feløgini sjálvi, ið eiga rættindini.Eg vildi tað verið snilt, um gjørd varð ein felagsavtalu gjøgnum SvF, men tað er einki, ið forðar fyri, at feløgini senda dystirnar hjá sær sjálvum, sigur Ísak Mikladal.

Hann nevnir, at tað hevur upp á tal, at gjørt eina avtalu um sjónvarpsrættindi til føroyskan fótbólt, og eitt uppskot um at senda beinleiðis fótbólt mánakvøld hevur eisini verið uppi og vent. Higartil er tó einki spurt burturúr. Sostatt er hesin møguleikin ógvuliga forkunnugur.

Eisini ein KT-fyritøka hevur vent sær til Føroya Tele við ætlanum um at kunna bjóða multimedia tænastur.

Onkur andaligur felagsskapur, m.a. ein í Eysturoynni, hevur eisini vent sær til Føroya Tele við fyrispurningi.

Somuleiðis eru fyrispurningar komnir frá lokal feløgum og einum felagi, sum ætlar sær undir at framleiða bíligari redaktionelt føroyskt sjónvarpstilfar.

Samband hevur eisini verið við ein føroyskan fjølmiðil, sum hevur vístáhuga fyri at víðka um sítt virksemi til eisini at umfata sjónvarp.

Einki konkret

Elin Heinesen veit at siga, at fyri tað heilt nógva bert eru talan fyrispurningar, og lítið konkret er á borðinum. Hon er júst farin undir at tosa við tey áhugaði, og hon sigur seg hava ilt við at siga nakað um, hvussu realistisk hugskotini eru.

– Hugskotini eru góð. Onkur hava eisini konkret hugskot, men tað verður í síðsta enda tann fíggjarligi parturin, sum verður avgerandi, sigur Elin Heinesen.

Hon nevnir, at skal hetta vera til veruleika, so er besta boði eitt slag av "community-TV" ella lokalt sjónvarp av onkrum slag. Fíggjarliga verður valla komin upp á sama støði sum Sjónvarp Føroya.

Enn er tað eisini ógreitt, hvussu tann fíggjarliga parturin verður skrúvaður saman. Talan verður í síðsta enda um at leiga ella keypa senditíð á Rás1. Nú skal so eitt kanningararbeiði so gerast.

Sinnaðir at fíggja talgilding

Stjórin í Televarpinum sigur, at teir eru sinnaðir til at gjalda ein part av kostnaðinum fyri at digitalisera signalið beinleiðis frá SvF

SJÓNVARP
Heri á Rógvi

Um stutta tíð kemur SvF eisini á móttakaran hjá Televarpinum. Hetta hava teir skyldu til sambært kringvarpslógini, men higartil hava ymsir tøkniligir trupulleikar forða fyri, at Sjónvarp Føroya er við.

Útgerð, sum skal gera analog signalið um til talgilt signal, er á veg úr Onglandi. Innan leingi skuldu Televarp-kundar fingið SvF á tveimum netum.

Tróndur Djurhuus, stjóri fyri Televarpið, sigur, at Televarpið er áhugað í at fáa digitalt signal beinleiðis frá kelduni, sum hann málber seg.

Hetta merkir, at eitt talgilt signal verður sent beinleiðis frá Sjónvarpi Føroya til Televarpið. Hetta fer at merkja broytingar fyri SvF, og hesar broytingar kosta sjálvsagt. Men Televarpið sigur seg vera sinnað til at gjalda ein part av hesum kostnaðinum.

– Vit vilja fegnir bjóða okkara kundum nøkur langtíðar tilboð, har vit hava eitt so gott produkt sum gjørligt. At senda SvF í bestu góðsku er eisini eitt forkunnugt tilboð til okkara kundar, sigur Tróndur Djurhuus.

Tá sent verður talgilt verður góðskan munandi betur enn analog, og møguleiki verður væntandi at senda munandi betur stereo ljóð.

Tekniski leiðarin hjá Sjónvarpi Føroya, Jón Heðin Tróndheim, hevur áður sagt fyri Sosialinum, at myndagóðskan frá umgjørda analog signalið í besta føri verður eins góð og tann verandi góðskan á analog sendinetinum.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa eina viðmerking frá sjónvarpsstjóranum.

Ágangur frá ES: Føroyingar aftur skuldsettir fyri dumping

Longu áðrenn ákæran ímóti føroysku alivinnuni um at dumpa prísin á laksi er avgjørd, er nýggj ákæra um dumping á veg

DUMPING
Áki Bertholdsen

– At skuldseta føroyingar dyri dumping, er eftir øllum at døma nýggja vápnið hjá ES londum, at kroysta føroysk alivinnuna.

Tað heldur Jan Mortensen, stjóri á Vinnuhúsinum. Longu áðrenn skuldsetingin ímóti føroyingum um at dumpa prísin á laksi er avgjørt, er ein nýggj ákæra um dumping á veg.

Hesuferð er føroyska alivinnan skuldsett fyri at dumpa prísin á síli, sum verða seld í ES.

Hóast ongin avgerð er tikin í hesum málinum enn, hevur Vinnuhúsið fingið at vita frá álítandi keldum, at ES fer uttan iva at taka málið upp. Vinnuhúsið hevur eisini fingið at vita, at tað hesuferð eru finlendingar, sum hava skuldsett føroyingar og norðmenn fyri at hava dumpað prísin á síli til ES.

Øll hesi dumpingmálini er rættiliga ørkymlandi hjá føroysku vinnuni

– Óvist er, um hetta verður síðsti ágangurin frá ES, tí dumping tykist at verða nýggja handilsvápnið hjá ES- londum ímóti føroyingum, heldur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum

– Í nøkur ár hava vit hildið, at so at siga allar forðingar fyri føroyskum útflutningi vóru ruddaðar av vegnum. Miðskeiðis í nítiárunum varð bøtt um handilsavtaluna við ES, so at flest allar tollforðingar fullu burtur. Og við heilsufrøðiligu avtaluni, sum varð gjørd í 2001, vóru nógvir praktiskir trupulleikar loystir, sum annars høvdu darvað flutninginum, tá ið vøran skuldi inn í ES lond.

Nýggj handilsverja

Men í summar merktu føroyingar fyrstu ferð vápnið hjá ES til handilsverju – dumping ákærur.

Jan Mortensen sigur, at síðani tollurin á heimshandlinum er minkaður í stórum, hava vinnur í ES og aðrastaðni, sum kenna seg trongdar av vinnum í øðrum londum, lagt seg eftir at ákæra kappingarneytarnar fyri dumping.

– Serliga eru tað handilsstórveldini USA og ES, sum hava nýtt dumpingvápnið. Og hagtølini hjá Heimshandilsstovninum yvir dumpingmál, vísa, at tey økjast munandi í tali á hvørjum ári.

Jan Mortensen vísir á, as alingin av síli hevur ikki sama týdning fyri Føroyar sum laksaalingin. Og møguligur tollur, ella aðrar marknaðarforðingar, hava heldur ikki so stóran týdning.

Sum er, kunnu vit bert útflyta 700 tons av sílum til ES, tollfrítt.

– Hinvegin eru dumpingmál sum hesi ógvuliga møtimikil hjá vinnuni. Hjá einum stórum veldi sum ES, hevur tað ongan týdning at føra eitt mál sum hetta, men hjá føroysku alivinnuni er tað drepandi.

Hann vísir á, at alivinnan hevur longu nú brúkt einar tvær milliónir krónur upp á at verja seg fyri ákæruni um um at dumpa laks.

– So hóast onki hald vísir seg at vera í ákærunum, tykist hetta at vera at vera ein taktikkur at royna at posa kappingarneytar.

Annars er tað ikki ES, men Japan, sum er høvuðsmarknaður fyri føroysk síl og tí er hetta málið eitt sindur øðrvísi enn ákæran um at dumpa laks, tí hvat laksi viðvíkur, er ES høvuðsmarknaður.

– Tað eru tey bestu sílini, sum verða seld til japan, men tað, sum Japan ikki vil hava, verður selt aðrastaðni og tey ganga sjálvsagt í lægri prísi, tí tey eru ikki líka góð, sum japan-sílini. Øðrvísi heldur Jan Mortensen ikki, at hetta málið er í veruleikanum.

Annars hava tey ikki havt umstøður at kann hesa ákæruna, so hvussu gott hald er í ákærunum, veit hann ikki enn.